VB-HB 0-2 (0-0):

# Eingin steðgar HB

**Tvey mál í ein minutt vissaðu HB stigini í Vági, og nú skal tað ganga verri enn illa, um teir ikki aftur í ár skulu fáa gullkrónurnar um hálsin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fyri tað nógva, so gekk spælið fyri seg á miðjum vølli, men tá HB fekk møguleikan, so tókku teir av tvær ferðir á rað*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Eftir tvey umfør vóru onkur, sum høvdu hug at smíla at HB. Útidystir móti Skála og EB/Streymi høvdu tilsamans bert givið eitt stig, og tí roknaðu mong við, at tað skuldi gerast sera tungt hjá HB at verja gullkrónurnar frá í fjør.

10 dystir seinni er støðan nakað øðrvísi. 28 stig eru fingin til høldar í hesum uppgerðum, og í dag tykist tað mest sum ófatuligt, at tað var í júst dystinum móti KÍ, at stigini vórðu mist.

Hóast tað enn resta seks umfør av landskappingini, so skal nógv til, áðrenn HB verður steðgað. Sunnudagin fingu teir annað árið á rað fult í Vági, har tað sjáldan er lætt at fáa stig, og dysturin hesaferð bendi eisini á, at HB framvegis hevur júst tær týdningarmestu dygdirnar hjá einum oddaliði. Nevnliga at koppa tøttu uppgerðunum til egnan fyrimun.

Í Vági var nevnliga fyri tað mesta talan um ein sera javnan dyst. Fyrra hálvleik royndu liðini fyrst og fremst at halda tætt í verjupartinum, og tað gav eisini tað úrslitið, at tað allar mesta av spælinum gekk fyri seg á miðjum vølli.

Seinna umfarið gjørdist kanska eitt lítið sindur meira opið, men fram til fyrra HB-málið hevði talan at kalla ikki verið um nakrar stórvegis møguleikar.

### Avgjørt í tveir minuttir

Men tá møguleikin so var har, so gjørdi HB skjótt av. Á tímanum slapp Heðin á Lakjuni ígjøgnum í vinstru síðu, og tá hann sendi innfyri, kundi ein púra blankur Jákup á Borg leggja oddaliðið á odda.

Ivaleyst ein skelkur hjá VB, og var hetta ikki nóg mikið, so hjálptu teir væl til sjálvur at økja um skelkin. Bólturin varð givin upp, og tá teir uttan serligt umhugsni spældu aftur eftir vøllinum, slapp Heðin á Lakjuni sær ímillum. Hann royndi seg við skoti, og tá Bjarni Johansen ikki fekk hildið hesum, kundi Heine Fernandez staðfesta, at øll trý stigini skuldu norður til Havnar.

Einki er at siga til, at vágbingar eftir hetta gjørdist heilt mótleysir. Í øllum førum hevði HB nú fult tamarhald á dystinum, og stigini vóru ongantíð veruliga í vanda.

Undan hesum umfarinum høvdu teir annars vunnið seg fram í góða støðu, men stóri vandin nú tykist vera, at teir kunnu enda í einum slagi av ongamannalandi. Nakað sum sjálvandi kann ávirka hugin hjá leikarunum at geva sítt allar ítarsta. Hinvegin kann ikki útilokast, at teir hóast alt aftur fara at leggja seg í oddastríðið, men skal tað henda, so skulu stig koma kontina heilt skjótt.

## Einki er vunnið enn

Hóast liðskiparin hjá HB, Rúni Nolsøe, sjálvandi var fegin um sigurin í Vági, so heldur hann framvegis, at tað er ov tíðliga at tosa um nakað meistaraheiti.

- Tað eru framvegis seks dystir eftir at spæla, so enn er alt ov tíðliga at tosa um tað. Men tað er einki at ivast í, at tað sær betri og betri út, helt hann eftir dystin.

Um sjálvan dystin í Vági helt Rúni, at tað kom væl við hjá teimum, tá teir í steðginum hoyrdu, hvussu støðan var í Havn.

- Sjálvandi hugsaðu vit fyrst og fremst um okkara, men tá vit hoyrdu, at GÍ var á odda og B36 hevði málverjan útvístan, tók hetta í øllum førum nakað av trýstinum frá okkum. Tí vóru vit kanska meira róligir, tá vit fóru út til seinna hálvleik.

- Og so haldi eg eisini, at tað nú má vera liðugt við tosinum um, hvussu trupult vit hava tað í Vági. Har hava vit so sanniliga ikki havt hagtølini við okkum, men nú hava vit so fingið fult tvey ár á rað, so eg haldi, at vit hava vent hagtølunum í so máta, staðfesti fegni liðskiparin at enda.

*-jm*

# Come-back til Heina

Árini 1994 og 1995 var ein av evna- og vónríku leikarunum í besta HB-hópinum Heini Gaard, sum royndi at vinna sær pláss á miðvøllinum.

Síðani hetta hevur tó verið lítið at hoyrt til hansara, tó at hann ofta hevur verið millum málskjúttarnar í aðru og triðju deild, tá hann hevur verið heima í summarfrí.

Útbúgvingin í Danmark varð tó liðug fyri góðum ári síðani, og sunnudagin gjørdist tað so til eitt óvæntað come-back á besta HB-liðnum hjá leikaranum, sum um tveir mánaðir verður 31 ár.

- Hetta hevði eg so slettis ikki roknað við. At byrja við í ár ætlaði eg bara at hugna mær, og eg havi bara vant einar tvær ferðir um vikuna. Men tað hevur gingið væl, og tá Heine spurdi meg, um eg hevði hug at venja við besta hópinum, tók eg av. Og nú havi eg so eisini fingið spælitíð, so tað er bara stuttligt, helt Heini Gaard eftir dystin.

Og í mun til støðuna fyri 10 árum síðani, so er tað nú sum álopsleikari, at Heini roynir seg.

- Ja, ja. Tað plagar annars at vera so, at menn arbeiða seg aftur eftir vøllinum, so hvørt sum árini ganga, men hjá mær er tað øvut. Og tað sigst jú eisini, at álopsleikarar toppa, tá teir eru um 30, so tað skuldi bara verið heilt gott, staðfesti nýggi maðurin í HB-hópinum eftir dystin.

*-jm*

### Gullið fer ongan veg

Og hvussu víkir og vendur, so skal nú heilt nógv til, áðrenn gullmerkini hjá HB skulu koma í vanda. Enn eru framvegis seks dystir eftir at spæla, men soleiðis sum HB hevur spælt seinastu nógvu umførini, so eru teir at rokna í einum flokki fyri seg.

Eftirverandi dystarskráin sær heldur ikki so ræðandi út. Gaman í plagdu dystir á Toftum og í Klaksvík ikki at vera av tí lættara slagnum, men soleiðis sum hesi bæði feløgini hava leikt í ár, so er illa hugsandi, at tey skulu seta kílar í fyri havnarmenninar.

Hjá VB sær hinvegin einki serligt út júst nú.

### fakta um dystin

**VB–HB 0-2 (0-0)**
0-1 Jákup á Borg, 62
0-2 Heine Fernandez, 63
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Eyðun Jacobsen, Anders Sørensen, Kári í Lágabø – Palli Augustinussen, Milan Kuljic, Poul Poulsen (81.: Jákup F. Olsen), Símun Samuelsen – Mindaugas Grigalivicius, Jón Pauli Olsen (68.: Dan Djurhuus).
**HB:** Bárður Johannesen – Vagnur Mohr Mortensen, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Jákup á Borg (68.: Rókur Jespersen), Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Heðin á Lakjuni (81.: Heini Gaard) – Rógvi Jacobsen, Heine Fernandez.
**Gult kort:** Mortan úr Hørg – Rógvi Jacobsen.
**Reytt kort:** Mortan úr Hørg, tvey gul.
**Dómari:** Lassin Isaksen.



ÍF-Skála 1-4 (0-3):

# Skála eigur fínt álop

**Talan var um dagen derpå hjá heimaliðnum, sum kortini ernaðist so mikið, at talan ikki gjørdist um stórtapið, ið lúrdi miðskeiðis í fyrra umfarinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen, joannes@sosialurin.fo*



*Tað var munandi meira broddur í Skála, enn tað var hjá heimaliðnum sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fuglfirðingar vóru rættuliga spentir. Tað sást eisini á áskoðarafjøldini. Sigurin í Runavík mánakvøldið í síðstu viku varð mettur at vera júst heilivágurin, sum skuldi til, fyri at fáa gongdina frá nógvu teimum seinastu ferðunum at venda. Men eftir fyrstu Skála vitjanina nakrantíð í landskappingardysti í fremstu røð staðfestu teir í ÍF, at hesa ferð var ikki hugsningur um. Teir vóru ov stuttir.

Hóast onkrir snuddir hava verið kring summarsteðgin, so halda teir á Skála stílin. Longu tá ið fyrra umfarið var hálvrunnið, høvdu teir fingið tvey mál, teir øktu dygst undan steðginum, og tá ið teir í fyrsta minuttinum eftir steðgin øktu til 4-0, var tað heilt avgjørt, hvør skuldi eiga stigini og hvør einki skuldi fáa.

Hjá ÍF tóktist høgra síða hava tað torført. Longu undan steðginum tóku teir avleiðingarnar og gjørdu tvær skiftingar. Kanska hjálpti hetta nakað, og kanska var ein onnur orsøk til, at talan í 2. hálvleiki ikki gjørdist um skrædl, at skálamenn — hóast teir tóktust ætla sær at vinna uppaftur størri sigur — á ein ella annan hátt vóru nøgdir. Í hvussu so er við úrslitið.

### Vandamiklu menninir

Hjá fleiri feløgum hevur stóri trupulleikin verið og er hann, at tað gongst illa at fáa mál, tí tyngdin og broddurin í álopinum eru ikki nóg góð. Soleiðis er tað ikki á Skála. Burtursæð frá oddaliðnum, HB, hevur einki lið so góðar álopsspælarar, sum Skála hevur teir.

Hesa ferð fekk Skála fýra mál, og teir báðir, Bogi Gregersen og Jónhard Frederiksberg, fingu tvey mál í part. Í 18. opg 20. minutti skoraðu teir hvør sína ferðina. Í tí fyrra førinum var Jónhard málskjútti, eftir at hann var komin rættuliga tætt undir málið, og í seinna førinum var tað Bogi, sum skoraði, eftir at hann var komin dygst undir málið og sendi framvið Karstini Joensen og í síðunetið.

Fimm minuttir undan steðginum krúllaði Bogi Gregersen seg leysan eitt sindur í høgru, áðrenn hann skoraði, og í fyrsta minuttinum eftir steðgin var tað Jónhard Frederiksberg, sum var árvakin, áðrenn fuglfirðingar rættuliga tóktust hava givið sær far um, at tað var farið undir seinna umfarið. Hann kom ímillum afturlegging og legði bóltin trygt í málið.

ÍF var onkra ferðina framvið, men teir fingu bara eitt mál. Tað kom ikki fyrrenn í næstsíðsta minuttinum. Málskjútti var nýggi maðurin, Sylla Amed, sum var í álopinum saman við Magna á Lakjuni. Hóast teir vóru frammanfyri við fýra málum, so var tað ikki serliga snilt av Arnholdi Berg, tá ið hann í egnum brotsteigi var ov lítið ansin. Fuglfirðingar fóru avstað við bóltinum, og so var 4-1.

Men eingin ivi var um, at gestirnir áttu tað betra fótbóltsliðið. Tað rakti meint hjá teimum, tá ið liðformaðurin og motorurin á miðvøllinum, Pauli G. Hansen, noyddist at taka seg aftur. Dómarin mundi ikki halda vera um serliga vandamikla støðu. Í hvussu so er bríkslaði hann ikki í sambandi við støðuna, sum hevði við sær, at Skála liðformaðurin noyddist at taka seg av válinum. Løtuna aftaná fingu fleiri av liðfeløgunum hjá honum gula kortið. Tað kundi tókst sum um, at teir vóru ikki sørt frustreraðir, eftir at liðformaðurin og týdningarmiklasti spælarin hjá teimum var farin av vøllinum.

Kortini hava við sær, at í hvussu so er tveir skálamenn fara at vera leikbannaðir, tá ið Skála næsta sunnudag fer at fáa vitjan av B68.

### FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-Skála 1-4 (0-3)**
**0-1:** Jónhard Frederiksberg 18.
**0-2:** Bogi Gregersen 20.
**0-3:** Bogi Gregersen 40.
**0-4:** Jónhard Frederiksberg 46.
**1-4:** Sylla Amed 89.
**Dómari:** Birgir Sondum
**ÍF:** Karstin Joensen - Áki Petersen (Sverri Ellingsgaard, 44.), Viggo Johannesen, Rúni Elttør, Fritleif í Lambanum - Eyðolvur R. Petersen (Hanus Eliasen, 44.), Jan Guttesen, Høgni Zachariasen, Høgni Madsen (Eyðun Ryggshamar, 73.) - Sylla Amed, Magni á Lakjuni
**Gult kort:** Høgni Madsen
**Skála:** Igor Kostic - Bárður Danielsen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu - Rúni Rasmussen, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen (Eugen Stancic, 60.), Alexandur Johansen - Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen
**Gult kort:** Pauli G. Hansen, Bárður Danielsen, Eugen Stancic, Nenad Stankovic
**Reytt kort:** Arnhold Berg (tvey gul 55. og 90.)

# Dýrt vunnin stig í Fuglafirði

**Tað er greitt á Skála, at Arnhold Berg og Bárður Danielsen ikki fara at spæla ímóti B68, og tað er stórur ivi um, hvussu tað fer at vera við liðformanninum, sum noyddist at taka seg aftur, tí hann var knæskaddur**

ÍF-SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar staðfestu sunnudagin, at teir høvdu spælt ímóti einum liði, sum var væl betri enn teirra lið. Tað fara ivaleyst at vera aðrar ferðir, tá ið tað verður størri møguleiki at fáa stig hjá ÍF, enn tað var ímóti Skála.

Hjá Skála varð staðfest, at sigurin hevði verið dýrt vunnin. Skálamenn fingu nógv kort í 2. hálvleiki, tá ið teir annars vóru greitt á odda, og eingin ivi tóktist vera um, at teir høvdu tryggjað sær øll stigini. Kortini hava við sær, at vongverjin í høgru, Bárður Danielsen, og miðverjin Arnhold Berg, fara at vera leikbannaðir, tá ið Skála næsta sunnudag fer at fáa vitjan av B68, sum roynir ikki at missa ÍF úr eygsjón.

- Vit eru serliga harmir um, at Pauli G. Hansen noyddist at fara av vøllinum, tá ið ein tími var farin. Hann fekk eina stempling inn á knæið. Tað sá ikki so gott út. Nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at taka seg upp, men vit vóna ikki, at tað eru meniskurin og liðbondini, sum eru løstaði. Pauli er fyri ikki so langari tíð síðani komin fyri seg eftir skaða í lærkrikanum, siga teir á Skála, og tað kennist á teimum, at tað er ikki frítt, at teir undrast á, at einki varð dømt, tá ið teirra liðformaður fekk henda løstin.

*Hvussu verður við meistaraheitinum?*

- Tað hava vit ongantíð roknað við, at vit fóru at vinna. Vit hava tikið ein dyst í senn og frøtt okkum um tað, sum vit hava fingið. HB hevur nógv gott fólk, og tá ið teir nú vunnu í Vági og øktu um fjarstøðuna aftur til tey næstu, so er eingin ivi um, at tað fara at verða teir, sum vinna FM. Tað svíður væl meiri hjá okkum, enn tað ivaleyst ger hjá teimum, tá ið spælarar verða skaddir ella leikbannaðir. Tað skal ikki skiljast soleiðis, at vit ikki fara at fáa mannað lið, men heldur er tað soleiðis, at tað rakar meinari, tí tað er minni eftir at taka av, tá ið fleiri eru burturi frá, staðfesta teir á Skála.

Í Fuglafirði verður staðfest, at tað heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað at fáa stig á heimavølli. Næstu ferð verður uppgávan ikki minni. Tá verður tað HB í Gundadali!